KPMG

Verkfrøðingur

til arbeiði innan HVS og ventilatión

Orsakað av vaksandi virksemi verður søkt eftir verkfrøðingi til arbeiði innan HVS og ventilatión til P/F Demich.

Starvið
Talan er um eitt spennandi og avbjóðandi starv, har tú m.a.:
- skalt stýra tí fíggjarliga og umsitingarliga undir projekterings- og uppsetingarstigunum
- kemur at brúka framkomnar edv-skipanir sum arbeiðsamboð
- kemur at taka tær av øllum fyrifallandi arbeiði innan HVS- og ventilatiónsarbeiði

Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður:
- er útbúgvin verkfrøðingur
- hevur førleika til at síggja nýggjar møguleikar innan arbeiðsøkið
- hevur evni at loysa krevjandi uppgávur
- hevur áhuga og førleika í at brúka IT sum part av arbeiðsamboðunum
- er tilvitaður um góðsku

Eisini skal viðkomandi hava góð samstarvsevni, verða fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber ella í seinasta lagi 1. februar 2002.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

Starv í Almanna- og heilsumálastýrinum

1 starv sum fulltrúi við tænastu á Almannadeildini verður við hesum lýst leyst til setan skjótast tilber ella eftir nærri avtalu

Uppgávan er í høvuðsheitum:
- at hava eftirlit við fíggjarligu gongdini á játtanunum innan almannamál á grein § 8 í fíggjarlógini
- at ráðgeva og vegleiða teimum ymisku stovnunum innan almannaøki viðvíkjandi gerð av fíggjarætlanum og uppfylging av hesum, soleiðis at fíggjarliga tilfeingi verður nýtt sum ætlað og í mun til aktivitet og kapacitet
- at skipa data og gera fráboðanir á øllum stigum
- at tryggja nøktandi leiðslukunning
- saman við roknskaparøkinum at tryggja eitt vælskipað datagrundarlag
- gera konsekvensútrokningar t.d. tá lógaruppskot verða gjørd.

Fyrimun hava umsøkjarar sum lúka hesi krøv:
Viðkomandi útbúgving innan fíggjarliga økið frá hægri læristovni, sum t.d. cand. polit., cand. merc., cand oceon ella líknandi.
Fólk við royndum/kunnleika innan arbeiði við fíggjarstýring kunnu eisini søkja.

Vit bjóða:
Sjálvstøðugt starv, til tíðir strævið, men eisini áhugavert, við fjølbroyttum uppgávum.
Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Løn- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.
Setanarøki er alt Almanna-og heilsumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovan.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra, tlf. 30 40 50

Umsókn:
Umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:

Almanna -og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 2. januar 2002 kl. 12.00

Ognir til sølu

Vegna
Sp/f Skósmiðjan í
SMS í likvidatión, verða
ognirnar hjá likvidatiónbúnum við
hesum lýstar til sølu, og tilskilar
likvidatiónsbúgvið sær rætt til at vraka og
velja ímillum tey innkomnu tilboðini ella ikki at
taka av nøkrum tilboði.

Áhugaði kunnu venda sær til

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 • 110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax. 311261

Volvo FL 614

Lastbilur við krana og trívegis vippu, er nýsýnaður,til sølu um nóg høgt boð fæst.

Tlf. 211732/441732

Starv

EDV-fólk

H e
h a

U p p
ps op tr pu
v e
m e

Á n e
N ý g
s a m s
S e

B e
h ó s k
v i t
f a k
s j á l vs

tS a
m á l

U m s ó

Strandfaraskip Landsins
a
B
F
o g

U m út
nA r a s s
a

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strand-faraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Tøknileiðari

Sjónvarp Føroya søkir eftir tøknileiðara.

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann umsitur alt innkeyp av KT- og tøkniútgerð. Hann er leiðari fyri dagligu tøkni- og KT-servisering-ina av framleiðslu og umsiting. Hann er leiðari fyri tøkni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving av starvsfólkunum í nýtslu av nýggjari tøkni. Sjónvarpið er miðskeiðis í eini umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni. Digitaliseringsætlanin er eitt sjálvstøðugt projekt, við einum eksternum ráðgeva knýttum at sær. Nýggi tøknileiðarin kann eftir egnum ynski heilt ella lutvíst yvirtaka hesa projektleiðslu.

Sjónvarp Føroya fyrireikar ein nýggjan bygnað, og kemur tøknideildin væntandi at gerast partur av framleiðsludeildini, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins. 5 størv eru í løtuni normerað beinleiðis undir tøknileiðaranum.

Útbúgving og royndir: Holla útbúgving innan KT- ella samskiftistøkni, ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Gott innlit í nýggjastu KT- og samskiftistøknina. Aðrar viðkomandi útbúgvingar og arbeiðsroyndir.

Royndir við arbeiði innan loftmiðlatøkni er ein fyrimunur, men eins stóran týdning hevur hollur kunnleiki til samskiftis- og KT-tøkni, og at tú hevur evnini at seta teg inn í nýggja tøkni og nýggjar uppgávur, analysera arbeiðsgongdir og finna og laga tøkniligar loysnir til tørvin í dagliga arbeiðinum hjá ymiskum starvsbólkum. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni.

Fyri tann rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi starv, har tú hevur møguleikan at vera við at menna nýggjar loysnir og arbeiðshættir fyri stovnin komandi árini. Sjónvarpið sum miðil stendur framman fyri kollveltandi tøkniligum avbjóðingum, har nógvir nýggir møguleikar fyri samskifti við brúkaran standa í boði. Sum tøknileiðari verður tú við til at ávirka, hvørja leið Sjónvarp Føroya skal velja í framtíðar tøknimenning síni.

Løn og setanartreytir: Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið er lønt í lønarbólki 8 og verður sett frá 1. mars, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 4. januar, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, telefon 340400.

svf
Sjónvarp Føroya

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.

Jólagávan til fløgusavnaran

Snildir fløguhaldarar, kunnu festast allastaðir, á veggin, upp undir eina hyll ella hvar tað skal vera

1 pakki (6 fløgur) fyri	kr. 58,-
2 pakkar fyri	kr. 96,-

Vælkomin inn á gólvið
hjá okkum úti á Argjum

iTec
Argjavegur 36 · Argir · itec@itec.fo
Tel. 356000 · Fax 356009

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2520, P/F Miðalberg, 900 Vágur.

Viðtøkur broyttar:
29.11.2001.
Nýggj adressa: 510 Gøta
Nýggjur heimstaður: Gøtu Kommuna
Nevnd:
Farin úr nevndini: Bergur Poulsen, Nýggivegur, 620 Runavík (formaður) og Poul Hansen, áarvegur 1, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Jógvan David Jacobsen, 512 Norðragøta (formaður), Tummas Thomsen, 513 Syðrugøta, Jógvan Hentze, 512 Norðragøta og Frits Thomsen, 513 Syðrugøta.

Skráseting Føroya tann 13. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3096, P/F Virðisbrævamarknaður Føroya, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Kristoffur Suni Laksá, 513 Syðrugøta.
Innkomin í nevndina: Ólavur Gregersen, J. Dahlsgøta 10, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 13. desember 2001

Kristin Balle

Sosialurin -har tað hendir

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil
- ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234